## Hátíðarlig setan av Mentanarvikuni

Sunnudagin kl. 15 verður tann hátíðarliga setanin av Mentanarvikuni. Setanin fevnir um bæði tónleik, skemt og rørslu. Umframt setanina verður sum undanfarna ár eisini skipað fyri heilsurenning. Magnus Rasmussen, borgarstjóri, fer at leiða setanina, og Hilmar Jan Hansen (myndin) fer at seta Mentanarvikuna 2010. Hornorkestrið fer sum altíð at seta sín dám á løtuna.



## Út at renna/ganga

Ein partur av setanini sunnudagin er møguleikin hjá fólki í øllum aldrum at renna ella ganga eitt ávíst strekki. Teinarnir, sum kunnu rennast/gangast eru hesir: Løkshøll – Ellisheimið – Rúnarvegur/Leitisvegur – Dalavegur – Heiðavegur – Løkshøll; og Løkshøll – Gerðisvegur – Posthúsbrekkan – Heiðavegur – Løkshøll. Áðrenn farið verður, fer Nósi at býta endurskin út til luttakararnar. Tá komið verður aftur, fáa øll vatnfløskur frá BankNordik.




**MØTAST**

*FAROEXPO er staðið, har bæði føroyskar og útlendskar fyritøkur hittast til at útveksla hugskot og framtíðar vinnulig sambond*

isku fyritøkurnar síggja fram til á hvørjum ári.

– Tað góða við hesum er, at tað ikki bert eru tær føroysku, men eisini tær útlendsku fyritøkurnar sum vilja luttaka á stevnuni í ár.

– Og tað sum ger tað uppaftur stuttligari er, at talan er í mongum førum um tær somu fyritøkurnar sum koma aftur og aftur, - bæði úr Føroyum og útlandinum, sigur Rannvá Troest.

Fyri fólkini handan Virkisráðgeving er í lítil ivi um, at tann einstaka fyritøkan veruliga fær nakað burtur úr við at koma á FAROEXPO á hvørjum ári.

– Og tað vóna vit sjálvandi eisini fer at henda aftur í ár.

### Størri marknað

Uttan at fara ov nógv inn á, hvussu ein slík vinnustevna sum FAROEXPO virkar í praksis, kann ein staðfesta, at hon virkar eftir ætlan, og sum ein slík stevna skal.

Júst hvørji ítøkilig úrslit tær ymisku fyritøkurnar eru komnar til, skal ikki verða sagt frá her. Men tað eru kortini nøkur viðurskifti, sum hava verið teimum at gagni.

Millum úrslitini kunnu nevnast at tær hava merkt eitt økt virksemi og at kundaskarin eisini er øktur. Eitt annað úrslit er, at tær haraftrat hava fingið eitt breiðari netverk.

– Og so hava tær eisini fingið ein størri marknað og eina økta sølu við at luttaka á FAROEXPO, slær Rannvá fast.

*snorri@sosialurin.fo*

**» Talan er í mongum førum um tær somu fyritøkurnar sum koma aftur og aftur, – bæði úr Føroyum og útlandinum**

**» Nú byrjar tað at líkjast tí, sum vit av fyrstu tíð ætlaðu við FAROEXPO**

## Fakta

**3:1**

Stóra tiltakið í Runavík hevur so líðandi funnið sín fasta form, nú FAROEXPO og Mentanarvika standa á skránni.

Í komandi vikuna verða ikki færri enn trý stór tiltøk samstundis - bæði almenn og óalmenn.

Tey almennu tiltøkini eru øll tey mongu tiltøkini á Mentanarvikuni og tiltøkini í sambandi við Ráðstevnuna. Hinvegin er partenariat-stevnan bert fyri tær fyritøkurnar sum hava meldað seg til.

Eingin ivi man kortini vera um, at øll fáa okkurt at fara til í hava Runavík í komandi viku.